tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.07.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, ~~Súsanna Bertholdsen~~

Varalimir: Jens Arni Hammerfoss Leo

Ikki møtt: Súsanna Bertholdsen

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 51/23 | 23/00071-5 | Uppskot um broyting av byggisamtykti - viðkan av havnarlagnum - februar 2023 |
| 52/23 | 22/00491-2 | Varðin Pelagic -umsókn um byggiloyvið til Protein & Lýsiverksmiði |

Borgarstjórin kunnar um, at Súsanna Bertholdsen hevur hin 18. apríl 2023 fráboða farloyvið frá býráðnum, og er Eyð Eidesgaard, ið er fyrst (1) valdi varalimurin á lista "C" Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 innkalla at møta til býráðsfundin.

Eyð Eidesgaard hevur fráboða kommunustjóranum, at hon metir seg verða ógegnina at viðgerða málin ið, eru á skrá til býráðsfundin 25. juli 2023.

Samb. kommunustýrislógina:

- *§ 10. Kommunustýrislimur hevur skyldu at boða frá, um hann heldur iva vera um sítt gegni.*
  - *Stk. 2. Kommunustýrið ger av, um ein kommunustýrislimur er ógegnigur.*
  - *Stk. 3. Er líkt til, at kommunustýrið tekur avgerð um, at kommunustýrislimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.*

Borgarstjórin ger vart við, at um, kommunustýrislimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.

Kristina Roest heita á borgarstjóran um at innkalla Jens Arni Hammerfoss Leo, ið er næst (2) valdi varalimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020.
Jens Arni Hammerfoss Leo hevur frammanundan havt sæti í býráðnum og tekur sostatt sæti til býráðsfundin 25. juli 2023.

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna og spyr um viðmerkingar eru til skránna –ongin viðmerking.

Til støðutakan

**51/23**

**23/00071-5 Uppskot um broyting av byggisamtykti - viðkan av havnarlagnum - februar 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.02.2023 | 5/23 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 13/23 |
| 4 Býráðið | 27.04.2023 | 33/23 |
| 5 Býráðið | 25.07.2023 | 51/23 |

**Málslýsing:**
Varðin Pelagic ynskir í skrivi dagf. 29-12-2022 at víðka virksemið, og hevur til tað endamál tørv á, at byggisamtyktin verður tillagað.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Tilmælið:**
Eftir áheitan frá Vinnu- og havnarnevndini,15-02-2023, og Tekniska nevnd, 15-02-2023, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri Tvøroyrar kommunu soleiðis, at Havnarøki "D" verður víðkað 100 m eystureftir, har uml. 8422 m2 er uppfylt sjóøki, 1919 m2 verður broytt frá neystaøki "G", og uml. 233 m2 verður broytt frá miðstaðarøki "A". Sí viðhefta kort-tilfar, umframt yvirlit yvir matr. nr., ið verða umfatað av broytingini.

Eisini verður mælt til, at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini soleiðis, at §29 Øki D: Havnarøki, stk. 4, verður orðað soleiðis: "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skorsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins."

Broytingin er markað við gulum.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. februar 2023:**
Nevndin varð kunnað um ætlanina.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Atkvøtt var um tilmælið hjá teknisku umsitingini.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest

Atkvøtt ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdeen
Tilmælið hjá teknisku umsitingini er harvið samtykt

**Kommunustjórin 15. apríl 2023:**
Kunngerð um broyting av byggisamtykt fyri havnaøkið "D" hevur ligið alment frammi til eftirlit á kommunuskrivstovuni samb. Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

*§ 6. 1) Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru liðnir frá kunngerðardegnum.*

Innkomin eru 2 mótmælir, har annað teirra eisini inniheldur broytingaruppskot:

- 23/00124 Mótmæli -til uppskot um broyting av byggisamtykt - víðkan av havnarlagnum -Rósing Rasmussen adv.
- 23/00125 Mótmæli og broytingaruppskot -til uppskot um broyting av byggisamtykt - víðkan av havnarlagnum -Livilig Kor

**Tilmælið:**

1. Tvøroyrar býráð verður at taka støðu til, hvørt ætlaða broytingin av byggisamtyktini fyri havnaøkið "D" skal fremjast og sendast landstýrismanninum til góðkenningar sum henda er samtykt av býráðnum 20. februar 2023 og eftirfylgjandi hevur ligið alment frammi til eftirlit, vísandi til Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.
   a. *§ 6. 1) Stk. 2. 1) Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar. Stk. 3. 1) Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1. Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingar-uppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum. Stk. 5. 1) Viðvíkjandi uppskotum, ið viðgjørd verða eftir reglunum í § 4, stk. 4, avger landsstýrismaðurin, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framløgd til eftirlitið umrøtt í hesi grein.*

2. Umsitingin mælir til, at umframt at Tvøroyrar býráð viðgerð og tekur støðu til innkomin mótmælir og broytingaruppskot hvør sær í serstakari málsviðgerð, viðgerð og tekur støðu til endurgjald til verandi neystaeigarar, ið hava beinleiðis mark til ætlaðu broyting, og harvið beinleiðs verða raktir og skerdir til neystavirksemið, vísandi til áseting um endurgjald í:

   *Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022. Endurgjald, § 14. Tá ið eitt øki samsvarandi byggisamtykt er lagt av til almenn hús ella virki, ella er ætlað til vegir, torg ella annað sovorðið og ognarmaður tess eftir meti metingarnevndarinnar smbr. § 15 missir møguleikan at nýta teir fyrimunir, ið økið hevur á rímiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaøkini í roynd verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka økið fyri endurgjald Stk. 2. Er økið bara ein partur av ognini, og vil avhendingin fáa tað í § 13 nevndu ávirkan á tann partin, ið eftir er, kann kravið um ognartøku kommununar umfata alt økið, sum tað er.*

**Býráðið 27. april 2023:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælið frá Vinnu- og Havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini um at halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum, tó so, at mælt verður til at tillaga orðingin í D: Havnarøki stk. 4 til: *«Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.»* -Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 19.07.2023:**
Tvøroyrar Kommuna hevur hin 11. juli 2023, móttikið teldupost við góðkenningarskriv og kortskjal frá Umhvørvismálaráðnum viðvíkjandi broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu – víðkan av havnalagnum.

Fráboðað verður, í góðkenningarskrivinum, sum er dagft. 10. juli 2023:

*Góðkenningarskriv*

> *Broyting i byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu - viðkan av havnalagnum*
>
> *Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 fra 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tvøroyrar kommuna í telduposti dagfestum 11. mai 2023 sent Umhvørvismálaráðnum uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu til góðkenningar.*
>
> *Uppskotið snýr seg um broyting av byggisamtyktini fyri havnaøki "D".*
>
> *Broytingin verður gjørd í sambandi við, at Tvøroyrar kommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvi fra P/F Varðin Pelagic til bygging av Protein- & lýsiverksmiðju á Tvøroyri eystan fyri verandi virkisbygning á havnarlagnum á Tvøroyri.*
>
> *Byggisamtyktin fyri økið verður broytt fra verandi Neystaøki G til Havnaøki D.*
>
> *Kommunan upplysir, at broytingin hevur ligið frammi fra 23. februar til 17. mars 2023. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 10. aprfl 2023, hevði kommunan móttikið tvey mótmæli.*
>
> *Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og í áliti dagfestum 3. juli 2023 viðmælir Býarskipanarnevndin broytingini.*
>
> *Sagt verður frá, at Umhvørvismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir at byggisamtyktin fyri Tvøroyrar kommunu verður broytt sum omanfyrinevnt.*
>
> *Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega*

*møguligar aðrar góðkenningar fra øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 fra 27. april 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.*

*Hjálagt rættað kortskjal fyri við atekning fra Umhvørvismalaráðnum.*

*Vegna Umhvørvismálaráðið J.N.D, fulltrúi*

Borgarstjórin mælir til, at býráðið umrøðir omanfyri góðkenning við støði í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, er í §7 er ásett «Beinan vegin byggisamtyktin er góðkend, skal kommunan fyri egnan kostnað kunngera hetta á vanligan hátt»

**Býráðið 25. juli 2023:**
Góðkenningarskrivið frá Umhvørvismálaráðnum dagft. 10. juli 2023 bleiv kunna, umrøtt og tikið til eftirtektar. Einmælt samtykt at heita á umsitingina at kunngerða broytingina av byggisamtyktini fyri havnaøkið D, samb. góðkenningarskriv og kortskjal frá Umhvørvisstovuni dagf. 10. juli 2023.

**52/23**

**22/00491-2 Varðin Pelagic -umsókn um byggiloyvið til Protein & Lýsiverksmiði**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.01.2023 | 2/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 15.02.2023 | 5/23 |
| 3 Tekniska nevnd | 15.02.2023 | 16/23 |
| 4 Býráðið | 20.02.2023 | 12/23 |
| 5 Býráðið | 25.07.2023 | 52/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 29.12.2022**
Kristin Michelsen, borgarstjóri hevur d.d. móttikið umsókn um byggiloyvið frá Boga Jacobsen, forstjóra í P/F Varðin og stjóra í P/F Varðin Pelagic til bygging av Protein- & Lýsiverksmiðju.

**Lógargrundarlag: Matrikkullógin og býarskipanarlógin**

**Tilmælið:**
Umsókn er komin frá Varðanum Pelagic, sum ikki er innan fyri karmarnar av verandi byggisamtykt galdandi fyri Tvøroyrar Kommunu. Mælt verður býráðnum til at taka støðu til umsóknina, hvørt umsitingin skal:

1. Gera uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri økið eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.
2. Loyva útfylling á sjógv eystan fyri verandi matr.nr 493a, har verandi virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur, har útfylta økið kann verða nýtt til staðseting av protein og lýsuverksmiðju hjá P/F Varðin Pelagic.

**Býráðið 26. januar 2023:**
Borgarstjórin mælir til at málið verður beint í Vinnu og havnanevndina. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 9. feb.2023:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

§6. (Kunngerð og framløga byggisamtykta)

*Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru liðnir frá kunngerðardegnum.*

*Stk. 2. 1) Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.*

*Stk. 3. 1) Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.*

*Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.*

*Stk. 5. 1) Viðvíkjandi uppskotum, ið viðgjørd verða eftir reglunum í § 4, stk. 4, avger landsstýrismaðurin, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framløgd til eftirlitið umrøtt í hesi grein.*

*Stk. 6. 7) Landsstýrismaðurin kann í heilt serligum førum, eftir áheitan frá kommunustýrinum, taka avgerð um at víkja frá ásettu freistum í stk. 1, soleiðis at framløgutíðin verður ásett til 1 viku og mótmælisfreistin til 1 viku frá kunngerðardegnum. Við áheitanini skal grundgevast fyri, hvørji týðandi samfelagslig og vinnulig atlit tala fyri, at umsóknin kann verða gingin á møti. Verður áheitanin gingin á møti, skal kommunan beinleiðis og persónligt kunna teir borgarar, ið beinleiðis verða ávirkaðir av broytingini, um hetta í seinasta lagi dagin eftir, at frávikið er givið.*

*Stk. 7. 7) Kærur sambært § 10 a um loyvir, ið eru givin við heimild í byggisamtykt, sum er fevnd av stk. 6, hava ikki steðgandi virknað.*

**Tekniska Deild 13-02-2023:**

Eftir áheitan frá býráðnum, 26. januar 2023, verður Vinnu- og havnanevndin biðin um at taka støðu til, hvørt umsitingin skal gera uppskot til byggisamtykt fyri økið (herundir sjóøkið) eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.

**Vinnu- og havnanevndin 15. februar 2023:**

Samtykt at heita á umsitingina at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, við korti, at leggja fyri býráðið. Talan er um at víðka Havnarøki D uml. 100m eystureftir, og at samstundis at broyta Neystaøki G, ið liggur innanfyri, til Havnarøki.

**Tekniska nevnd 15. februar 2023:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu-og havnanevndini. Umsitingin ger uppskot til broyting av byggisamtyktini, og tað verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 20. februar 2023:**

Súsanna Bertholdsen mælir til, at støða verður ikki tikin til málið at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, fyrr enn býráðið hevur havt fund við bólkin «Livilig Kor á Tvøroyri», sum hevur biði um fund við býráðið.
Atkvøtt var um tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen.
Fyri eru: Súsanna Bertholdsen
Ímóti eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg Jespersen Bech
Atkvøtt blank: Bjarni Hammer og Kristina Roest
Tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen er harvið ikki samtykt.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest
Ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdsen
Tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd er harvið samtykt.

**Kommunustjórin 19. Juli 2023**
Nú Umhvørvismálaráðið hin 10. juli 2023 -við heimild í § 4 í býarskipanarlógini- hevur góðkent, at byggisamtyktin fyri Tvøroyrar kommunu verður broytt í sambandi við, at Tvøroyrar kommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvi frá P/F Varðin Pelagic til bygging av Protein- & lýsiverksmiðju á Tvøroyri eystan fyri verandi virkisbygning á havnarlagnum, mælir Borgarstjórin til, at Tvøroyrar Býráð viðgerð og tekur støðu til tilmælið at:

- Loyva útfylling á sjógv eystan fyri verandi matr.nr. 493a, har verandi virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur, har útfylta økið kann verða nýtt til staðseting av protein og lýsuverksmiðju hjá P/F Varðin Pelagic.
- P/F Varin Pelagic útvegar øll onnur neyðug myndugleika loyvir, ið skulu fyriliggja áðrenn byrja verður uppá at útfylla grót á sjógv.
- Útfyllingin verður framd við avlops gróti úr Hvalbiartunnlinum, sum Tvøroyrar kommuna er eigari av, og sum verður latið til verkætlanina ájavnt gjaldskránna hjá Landsverk fyri m3.
- P/F Varðin Pelagic ber í fyrsta umfarinum allan kostnaðin av útfyllingini, íroknað grótinum og flutingin av hesum úr Hvalbiartunnlinum.
- Áðrenn endaligt byggiloyvið verður givið til bygging av Protein- & Lýsiverksmiðju, verður serstakur sáttmálið gjørdur millum P/F Varðin Pelagic og Tvøroyrar kommuna fyri útfylta sjóøkið.

**Býráðið 25. juli 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá borgarstjóranum.

Fundurin lokin kl. 17:30

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Jens Arni Hammerfoss Leo